# Steypakapping í fimleiki

**FIMLEIKUR** Nógvur amboðsfimleikur verður at síggja í Fimi í morgin, tá steypakapping aftur er á skránni





Hilmar Jan Hansen

Í morgin verður tann triðja og síðsta av steypakappingunum í amboðsfimleiki, og hesa ferð er tað fimleikafelagið Ljósið, ið tekur sær av at skipa fyri. Kappast verður í Fimi í Havn, har lagt verður til brots longu fyrrapartin klokkan 11, tá gentur og smágentur kappast.

Seinnapartin standa so kvinnur, menn, kvinnuunglingar, mansunglingar og dreingir fyri tørni, og tey byrja sínar kappingar klokkan 14. Hesa ferð kappast konufólkini á gólvi, og mannfólkini kappast í lopi, ringum og beinsveiggi.

Tær báðar undanfarnu steypakappingarnar hava tilsamans 33 konufólk og 24 mannfólk verið við, og hóast summi hava vunnið í fleiri greinum, hevur verið størri spenningur í øðrum greinum, har vinnararnir ikki hava verið teir somu. Tí kann væntast ein spennandi kapping í morgin.

Tá steypakappingin er liðug, kunnu amboðsfimleikararnir síggja fram til næstu avbjóðingina, sum verður føroyameistarakappingin fyri einstaklingar. Hon er í tveimum, so tey yngru kappast 9. og 10. apríl og tey eldru 14. og 15. mai.

hilmarjan@sosialurin.fo



## Fallulah á G!

G! Festival kunngerð í kvøld 4 nýggj nøvn á skránni, tað kendasta av teimum er danskt-rumenska stjørnuskotið Fallulah, sum júst herfyri vann P3 Gull prísin og sum átti mest spælda lagið á danska P3 í 2010. Herheima liggur hon í løtuni á triðja sinni innan fyri eitt ár á 15 teimum bestu við lagnum "out of it" sum eisini er eyðkennislag til sendirøðina "Lykke". Í juli í ár gongur leiðin til Føroya á G! Festival.

Festivalurin avdúkar samstundis at íslendsku Skálmøld, føroysku Hamferð øg Sement vinnararnir 2011, Guðrun & Bartal, leggjast afturat skránni, sum framanundan telur Blind Boys of Alabama (US), Meshuggah (SE), Movits! (SE) og The Tennesee Mafia Jug Band (US).

Tú kanst lesa meira um bólkarnar á www.gfestival.fo <http://www.gfestival.fo>

## Í MORGIN




Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og seinnapartin ella um kvøldið regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

## SUNNUDAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt, men um kvøldið regn. Hitin millum 3 og 6 stig.

## MÁNADAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og regn av og á. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Týsdagin upp í stívt andøvsgul av suðri og ælingur, mikudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Ein hitabrúgv við Føroyar fer í útnyrðing. Eitt lágtrýst, 978 hPa. á 52N-21V fer í útnyrðing.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í útsynning og brúgvalagið haðani kemur hendavegin.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 95 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | -5 | Tromsø | -- | Moskva | 0 | Athen | 14 |
| Reykjavík | 2 | Bergen | 0 | Berlin | 5 | Beijing | 0 |
| Tórshavn | 4 | Oslo | -9 | Paris | 13 | New Dehli | 19 |
| Lerwick | 3 | Stokkhólm | -4 | Madrid | 8 | Bangkok | 31 |
| Aberdeen | 4 | Keypmannah. | 0 | Róm | 13 | Sydney | -- |
| London | 13 | Helsinki | -6 | Malorca | 16 | New York | 0 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

18. febr. Fullmáni
19. febr. Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. feb. | 06:18 | 18:42 | 05:18 | 17:42 | 05:33 | 17:57 | 08:18 | 20:42 | 09:18 | 21:42 | 04:33 | 16:57 |
| 19. feb. | 07:06 | 19:31 | 06:06 | 18:31 | 06:21 | 18:46 | 09:06 | 21:31 | 10:06 | 22:31 | 05:21 | 17:46 |
| 20. feb. | 07:56 | 20:21 | 06:56 | 19:21 | 07:11 | 19:36 | 09:56 | 22:21 | 10:56 | 23:21 | 06:11 | 18:36 |
| 21. feb. | 08:47 | 21:12 | 07:47 | 20:12 | 08:02 | 20:27 | 10:47 | 23:12 | 11:47 | - | 07:02 | 19:27 |
| 22. feb. | 09:38 | 22:05 | 08:38 | 21:05 | 08:53 | 21:20 | 11:38 | - | 00:12 | 12:38 | 07:53 | 20:20 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. feb. | 03:33 | 15:57 | 06:33 | 18:57 | 07:33 | 19:57 | 06:03 | 18:27 | 07:18 | 19:42 |
| 19. feb. | 04:21 | 16:46 | 07:21 | 19:46 | 08:21 | 20:46 | 06:51 | 19:16 | 08:06 | 20:31 |
| 20. feb. | 05:11 | 17:36 | 08:11 | 20:36 | 09:11 | 21:36 | 07:41 | 20:06 | 08:56 | 21:21 |
| 21. feb. | 06:02 | 18:27 | 09:02 | 21:27 | 10:02 | 22:27 | 08:32 | 20:57 | 09:47 | 22:12 |
| 22. feb. | 06:53 | 19:20 | 09:53 | 22:20 | 10:53 | 23:20 | 09:23 | 21:50 | 10:38 | 23:05 |